# Dugi ikki at síggja nakran vanda fyri nýggja Smyrli

**– Hvørki skipasmiðjan ella spanska stjórnin hava nakran sum helst áhuga í, at eitt viðskiftafólk skal koma illa fyri av eini avgerð hjá ES, sigur Reidar Nónfjall, sum gjørdi sáttmálan um nýggja Smyril**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Eg dugi als ikki at ímyndsa mær, at nakar vandi skal vera fyri nýggja smyrli, sigur Reidar Nònfjall, sum var stóri á Strandferðsluni, tá ið sáttmálin um skipið varð gjørdur. Hann sigur, at Strandferðslan tryggjaði seg so væl sum yvirhøvur tilber*

– Eg dugi ikki at ímynda mær, at nakar vandi er fyri nýggja Smyrli

Tað sigur Reidar Nònfjall, sum var stjóri á Strandferðslurin.

Reidar Nónfjall var stjóri á Strandferðsluni, tá ið samráðst varð um sáttmálan um nýggja Smyril og tað var eisini hann, sum gjørdi sáttmálan lidnan.

Nú í vikuni visti Útvarpið at siga, at spanska skipasmiðjan, sum byggir skipið, hevur fingið stuðul frá spanska landskassanum, men at hesin stuðulin hevur verið í stríð við ES-reglur. Sostatt skal skipasmiðjan betala spanska landskassanum heilar fýra milliardir aftur.

Tað hevur reist spurningin, um Skipasmiðjan fer at klára at gjalda peningin aftur, og um vandi av tí sama er fyri, at nýggi Smyril ikki verður liðugur. Ella um vandi er fyri, at landið fer at missa pening, sum tað longu hevur goldið fyri Smyril.

Tað heldur Reidar Nónfjall ikki.

– Vit høvdu fremstu løgfrøðiligu ráðgevingina í ríkinum til taks, tá ið vit gjørdu sáttmálan og vit hava tryggjað okkum so væl, sum yvirhøvur tilber, sigur hann.

## Fara at gera alt

Reidar Nònfjall vísir á, at tað eru bara fimm mánaðir til nýggi Smyril skal vera liðugur og tað er stutt tíð í hesi verðini.

– Tí kann eg ikki ímynda mær annað enn at skipið verður gjørt liðugt.

Hann er eisini sannførdur um, at hvørki skipasmiðjan ella spanski staturin hava nakran sum helst áhuga fyri, at eitt viðskiftafólk skal koma illa fyri av eini ES avgerð.

– Tí fara tey at gera alt fyri, at halda sáttmálan og tí ivist eg heldur ikki í, at vit hava trygd fyri at fáa skipið. Í allar ringasta føri kann tað verða eitt sindur seinkað, men tað trúgvi eg heldur onki uppá, sigur Reidar Nónfjall.

Men skuldi tað óhugsandi hent, at skipasmiðjan fer í gjaldssteðg beinanvegin av hesum her, ivist eg ikki í at ein avtala fæst um at gera skipið liðugt.

Og eydnast tað ikki í Spania, verður tað onkra aðrastaðni.

Hann vísir eisini á, at tað er innbygt í sáttmálan, at skipið skal gerast liðugt, og tað er ikki nakað, sum kann verða skúgvað til viks.

Tað kann eisini vísast á, at skipasmiðjan, sum bygdi nýggju Norrønu, fór í gjaldssteðg, men tá varð avtala gjørd um, at Norrøna varð gjørd liðug.

## Sera góð trygd

Hann vísir eisini á, at talan er um eitt skipasmiðjusamtak, sum spanski staturin eigur og tað skuldi verið ein hampiliga góð trygd.

– So er ikki okkurt heilt annað galið, sum vit onki vita um enn, dugi eg als ikki at ímynda mær, at hetta skal fáa nakrar sum helst avleiðingar fyri byggingina.

Men so leggur hann afturat, at skuldi okkurt annað verið galið, ivast hann ikki í, at Skipasmiðjan hevur skyldu at greiða Strandferðsluni frá tí.

Hann sigur, at annars var tað ongin loyna, at talan var um eina skipasmiðju, sum hevði givið hall. Tað er ein sannroynd, at tað hevur verið arbeiðsloysi í Spania eins og alla aðrastaðni. Tað er heldur ongin loyna, spanski statskassin hevur sprænt pening í skipasmiðjuna fyri at halda henni gangandi, eins og føroyski landskassin so mangan hevur gjørt.

– Men hatta hevur onki við nýggja Smyril at gera. Tað, sum vit tryggjaðu okkum, var, at skipasmiðjan ikki fekk ólógligan stuðul til nýggja Smyril, sum kundi elva til trupulleikar og tað fingu vit trygd fyri frá okkara ráðgevarum, sum eru teir fremstu á økinum.

Somuleiðis vísir hann á, at skipið er komið rættiliga langt áleiðis.

– Alt tað, sum er gjørt og goldið, eigur føroyski landskassin. Sostatt eigur landskassin skipið, sum tað liggur nú. Harafturat er full bankatrygd fyri tað, sum er goldið í forskoti.

## Kunnu draga málið út

IZAR- skipasmiðjusamtakið, sum byggir nýggja Smyril, er ein ovurhonds stór fyritøka. Talan er um nýggju skipasmiðjur og virki runt um Spania. Talan er um næststørsta skipasmiðjusamtakið í Evropa, og tað níggjunda størsta í øllum heiminum.

Sostatt er talan um ein sannan risa, so hóast fýra milliardir er ein sera stór upphædd, er tað ikki vist, at tað fer at enda á skipasmiðjuni.

Tað liggur heldur ikki í kortunum, at peningurin skal fella til gjaldingar her og nú.

Reidar Nònfjall ivast eisini í, um Skipasmiðjan uttan nakað, fer at góðtaka eina eyka rokning frá ES upp á fýra milliardir.

– Tað er væl hugsandi, at teir fara víðari við málinum, so at endaliga avgerðin sostatt verður drigin út og tað kunnu saktans ganga fleiri ár, áðrenn ein endalig avgerð er fallin, sigur hann.

– Og nýggi Smyril skal altso avleverast longu um fimm mánaðir, minnir hann á.

# Tónleikur í Atlantis

**Leygarkvøldið og sunnudagin verður skipað fyri tveimum áhugaverdum tónleikatiltøkum í Atlantis**

KONSERT
*Tíðindaskriv*



Leygarkvøldið klokkan 21:00 fara næmingar úr musikkskúlanum í Klaksvík at framføra í Atlantis. Hetta eru næmingar,sum hava gingið til rytmiska undirvísing. Næmingarnir fara at framføra fleiri kend løg, har ímillum Africa hjá Toto og Could You Be Loved hja Bob Marley.

Gestasangarar verða eisini við. Her kunnu vit nevna Arnfríð Lützen og Karl Martin Samuelsen, sum bæði, mangan hava gjørt vart við seg á føroyska tónleikapallinum. Eisini verður pláss fyri instrumentalum tónleiki har næmingarnir fáa høvi at vísa, hvør dugur er í teimum.

Heri Joensen, sum tey flestu kenna frá rokkbólkinum Týr, hevur í vetur tikið sær av guitarundirvísingini í musikkskúlanum. Guitarnæmingar hjá honum fara at framføra nøkur løg. Har ímillum kunnu vit nevna Every Breath You Take, hjá The Police og Hotel California hjá Eagles.

Talan er sostatt um eina fjølbroytta konsert, har tónleikur verður framførdur til bæði ung og eldri. Kostnaðurin fyri hetta tiltakið er 60 kr.

Sunnudagin kl 17:00 fer Stanley Samuelsen á pallin í Atlantis. Stanley, sum er búsitandi niðri er í løtuni heima, og tað hevur eydnast okkum at fáa hann at framføra í Atlantis. Stanley hevur fyrr verið at hoyrt í Klaksvík, eitt nú var hann við á ábyrgdarafundinum hjá Norðoya Sparikassa, sum var í KÍ høllini fyri einum góðum ári síðani.

Stanley hevur drúgvar royndir innan føroyskan tónleik. Eitt nú hevur hann spælt við fleiri bólkum her heima, áðrenn hann flutti til danmarkar.

Stanley hevur eisini givið fløgu út við føroyskum sangum. Uttan iva er tað onkur, sum kennist við sangin Um eg kundi kvøðið, sum javnan er at hoyra í útvarpinum. Stanley verður einsamallur á pallinum, har hann fer at syngja og spæla guitar. Atgongumerkir á 100 kr. fáast í húsinum ein tíma undan konsertini.



# Tvey rúsevnismál í rættinum týsdagin

**Fyrradagin vóru tvey mál fyri í Føroya Rætti, har tveir ungir mans vóru ákærdir fyri brot á lógini um rúsevnir**

RÆTTARMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Ein 16 ára gamal drongur játtaði seg sekan í at hava fleiri amboð, ið verða nýtt í sambandi við nýtslu av hashi, tá ið málið móti honum var fyri í Føroya Rætti týsdagin.*

*mynd: Tóra Winther Reinert*

Tað fyrra málið snúði seg um ein 20 ára gamlan mann av Argjum, sum í trimum førum varð skuldsettur fyri keyp av tilsamans okkurt um 120 gram av hash. Í tí fyrstu ákærini var ungi maðurin skuldsettur fyri at hava keypt 46 gram av hashi, harav tey 16 vóru fyri ein annan mann.

## Játtaði seg sekan í øllum ákærum

Í teirri næstu ákæruni varð skuldsetti ákærdur fyri at hava keypt 8 gram av hashi fyri ein annan persón, og sum samsýning fyri ómakin fekk ákærdi okkurt um 2 gram av hashi til sín sjálvs.

Triðja ákærin snúði seg um, at tann ákærdi saman við einum øðrum manni hevði keypt 52 gram av hashi til egna nýtslu. Tann ákærdi greiddi frá, at hashið í flestu førum var keypt frá sama manni í einari bygd í miðstaðarøkinum, og at prísurin var 125 krónur fyri grammið.

Tann 20 ára gamli maðurin játtaði seg sekan í øllum trimum ákærum, og hann tók ikki av tilboðnum um at fáa ein skikkaðan løgfrøðing at verja seg.

Ákærin kravdi, at maðurin fekk ein treytaðan fongsulsdóm, millum annað tí at talan var um rættuliga stórar nøgdir av hashi, sum ákærdi hevði keypt, og eisini var víst til straffiattestuna hjá ákærda. Har stóð millum annað, at tann 20 ára gamli maðurin tvær ferðir áður hevur fingið bót fyri brot á lógina um rúsevnir. Harafturat hevur hann eisini fingið bót fyri brot á vápnalógina.

Dómarin í málinum avgjørdi at døma ákærda sjey daga treytaða fongsulsrevsing við einari royndartíð upp á tvey ár, og ákærdi tók á staðnum við dóminum.

## Fýra ákærur móti 16 ára gomlum

Í seinna málinum um brot á rúsevnislógina, sum var fyri í Føroya Rætti týsdagin, var ein 16 ára gamal drongur úr høvuðsstaðnum ákærdur fyri fýra ymisk lógarbrot. Í tveimum førum var drongurin ákærdur fyri at hava keypt hash, og í einum føri varð tann 16 ára gamli ákærdur fyri at hava ymiskar lutir, ið verða nýttir í sambandi við hash, so sum pípa og brúkt staniol.

Tann fjórða ákæran móti dronginum var um stuldur. Ungi drongurin var saman við tveimum øðrum skuldsettur fyri í oktobur seinasta ár at hava roynt at brotið inn umborð á fleiri bátum, sum lógu við Skipasmiðjuna í Havn.

Drongurin játtaði seg sekan í tí eina málinum um keyp av rúsevnum, har hann varð skuldsettur fyri, saman við einum øðrum at hava keypt okkurt um 16 gram av hashi til egna nýtslu, og eisini játtaði hann seg sekan í ákæruni um at hava ymiskar lutir, ið verða nýttir í sambandi við hash-nýtslu.

Hinvegin noktaði 16 ára gamli drongurin seg sekan í tí einu ákæruni, har hann varð skuldsettur fyri, saman við einum øðrum, at hava keypt umleið 25 gram av hash. Ungi drongurin segði, at hann hevði verið saman við einum øðrum, ið hevði keypt hashið, men at hann sjálvur ongan part átti í tí, hóast hin hevði bjóðað honum burturav.

Tann fjórða ákæran um stuldur, helt ákærdi verða púra burturvið. Hann greiddi rættinum frá, at hann hevði verið á økinum hjá Skipasmiðjuni hetta kvøldið, og at hann fygdist við tveimum øðrum monnum, sum fóru umborð á nakrar bátar. Ákærdi segði, at hann hevði einki við hetta málið at gera, og at hann ikki hevði verið umborð á nøkrum báti. Tá ið frágreiðingin, sum ungi maðurin hevði givið løgregluni sama kvøld, sum hendingin á Skipasmiðjuni fór fram, var lisin upp fyri ákærda, vildi tann 16 ára gamli verða við, at kludur var komið í frágreiðingina. Hann segði, at frágreiðingin ikki var í samsvar við tað, ið hann hevði greitt løgregluni frá, hóast hann sjálvur hevði skrivað undir frágreiðingina, eftir at hon var gjørd.

Dómarin í sakini móti tí 16 ára gamla gjørdi av, at av tí at so nógvir leysir endar vóru í sambandi við nakrar av ákærunum, varð neyðugt at útseta málið til einaferð seinni, tá ið málið væntandi kann endaliga avgreiðast.




BARRVØRÐUR
Í HAFNIA LOUNGE

Vit sóknast eftir barrvørði at arbeiða fulla tíð.

Tað krevst, at tú:
- ert fyrikomandi
- ert álítandi
- hevur góð samstarvsevni
- ert áhugaður at læra nýtt
- ert 18 ár ella eldri
- ert tænastuáhugaður

Altjóða dámur og miðbýarhugni verða sjóvaði saman í okkara hugnaligu Lounge, har vit nú kunnu bjóða tær eitt spennandi og áhugavert starv.

*Meira fæst at vita við at venda sær til*
Michael Jensen ella
Petur Hentze



P/F Hotel Hafnia
Tel 31 32 33 · Fax 31 52 50